## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av eystri, um kvøldið veksur hann vindin upp í skrið. Stundum regn og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Regn av og á og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

Samanstoytur á Vestmannavegnum:

# Kálvurin mátti lúta

Mánadagin hendi eitt ferðsluóhapp á Vestmannavegnum, norðanfyri Kvívík.

Ein eldri maður kom koyrandi eftir vegnum, ávegis til Vestmanna, tá hann brádliga varnaðist ein ungan tarvkálv, ið gekk mitt á vegnum. Maðurin høgdi bremsurnar í, men ov seint var. Vanlukkutíð rendi henn beint á kálvin, sum við nógvari ferð fór sleingjandi upp um bilin.

Hetta mundi elvt til eina størru vanlukku, tí tvær motorsúkklur koyrdu aftanfyri bilin. Onnur teirra mundi fingið kálvin, sum við nógvari ferð fleyg upp bilin, omanyvir seg. Tíbetur var motorsúkkluførarin vakin, og fekk vent undan.

Bóndin, sum býr í Kvívík, og løgreglan vórðu beinanvegin boðsend.

Tá løgreglan úr Havn kom á staðið, var kálvurin longu skorin á háls og flettur. Bóndin tók vombina innan úr kálvinum, og lat mannin, sum hevði rent á hann, eiga stóra krovið.

Løgreglan setti seg beinanvegin í samband við brandstøðina í Havn, tí bilurin var so mikið illa farin, at hann ikki fekk koyrt. Hann varð tí fluttur til Havnar á verkstað.





Løgreglan sigur, at maðurin ikki hevur koyrt ov skjótt, og at bóndin allarhelst fær virði á kálvinum aftur frá tryggingini.

### Hendir ofta

Løgreglumaðurin úr Havn, sum kom á staðið, sigur, at tað ikki er sjáldan, at djór verða ákoyrd.

– Nú koyri eg sjálvur á Kaldbaksvegnum hvønn dag, og tað er sera ofta, at ákoyrdur seyður liggur framvið vegnum. Serliga har, ið hegn ella autoverja ikki er, henda ofta óhapp av hesum slagi, sigur hann.

Hann sigur víðari, at um fólk koma út fyri einum líknandi óhappi, eru tveir møguleikar.

– Bóndin skal sjálvandi altíð hava tað at vita. Um skaði ikki er komin á bilin, ber ofta til at orna tað innanhýsis við bóndan. Er bilurin hinvegin skaddur, ringja fólk ofta til løgregluna, fyri at fáa eina skaðarapport til tryggingina, greiðir vakthavandi frá.

Hann sigur, at um førarin ikki hevur koyrt ov skjótt ella hevur koyrt ávirkaður, verður ikki nógv gjørt við eina tílíka sak.

– Hóast tú koyrir á eitt djór, verður tað ikki mett sum eitt álvarsligt brot á ferðslulógina, og tí verður einki arbeiði gjørt við at finna skuldaran í sakini, sigur hann at enda.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 11 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 24 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 13 |
| New York | 13 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 988 hPa. skamt vestan fyri Føroyar fer suðureftir og dýpist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.




Lágtrýstið yvir Írska Havinum fer norðureftir og dýpist. Tað gevur nógvan vind av eystri mikudagin. Hátrýstið yvir Grønlandi fer vestureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/10 kl. 06⁰⁰–19/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 18/10 kl. 06⁰⁰–19/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 79,0 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

17. oktober: Mánin næstur jørðini
20. oktober: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. okt | — | 12.43 | 11.43 | — | 11.58 | — | 01.59 | 14.43 | 02.59 | 15.43 | 10.58 | 23.43 | 09.58 | 22.43 | 00.14 | 12.58 | 01.14 | 13.58 | — | 12.28 | 00.59 | 13.43 |
| 21. okt | 01.28 | 14.09 | 00.28 | 13.09 | 00.43 | 13.24 | 03.28 | 16.09 | 04.28 | 17.09 | — | 12.24 | 11.24 | — | 01.43 | 14.24 | 02.43 | 15.24 | 01.13 | 13.54 | 02.28 | 15.09 |
| 22. okt | 02.51 | 15.17 | 01.51 | 14.17 | 02.06 | 14.32 | 04.51 | 17.17 | 05.51 | 18.17 | 01.06 | 13.32 | 00.06 | 12.32 | 03.06 | 15.32 | 04.06 | 16.32 | 02.36 | 15.02 | 03.51 | 16.17 |
| 23. okt | 03.44 | 16.09 | 02.44 | 15.09 | 02.59 | 15.24 | 05.44 | 18.09 | 06.44 | 19.09 | 01.59 | 14.24 | 00.59 | 13.24 | 03.59 | 16.24 | 04.59 | 17.24 | 03.29 | 15.54 | 04.44 | 17.09 |

5 707265 100036 >